# Tikin á bóli hvønn dag

**Suni Vinther, formaður í Reyða Krossi Føroya, sigur seg vera tiknan á bóli av tí stóru hjálpini, sum føroyingar vilja veita Asia. – Tað hendir so nógv, at eg satt at siga ikki veit við vissu alt sum fer at henda, sigur hann**

TSUNAMI
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*




*Landsumfatandi bússuinnsavnanin fer av bakkastokki sunnudagin kl 15. Suni Vinter, formaður í Reyða Krossi Føroya, sigur, at ætlanin er at náa øllum húskjum í Føroyum.*

Mynd: Jens Kr. Vang

– Eg skal siga tær tað, at her hevur gingið so nógv fyri seg hesar seinastu dagarnar, at eg eri ikki heilt fullgreiður um, júst hvørjar ætlanir eru í løtuni, sigur suni Vinther, tá vit ringja til hann tíðliga mikumorgunin.

– Tað eru so nógv fólk við í hjálpararbeiðnum, sum taka sær ábyrgdina av at samskipa ymsik tiltøk, at eg veit tey ikki øll í høvdinum beint í løtuni.

### Bússuinnsavnan

Eitt er tó, sum heilt víst er komið undir land, og tað er landsumfatandi bússuinnsavnanin, sum verður sunnudagin.

– Sunnudagin frá kl 15, verður roynt at farið í hvørt hús í landinum við reyða kross bússum. Postboðini koma nokk at vera høvuðssamskiparar, við góðari hjálp frá skótahjálpini, fólkaskúlunum, fólki frá reyða krossi og ísf, greiðir Suni Vinther frá.

Hann veit at siga, at bússurnar verða koyrdar út á økini í kvøld, og at tað av øllum alvi fer at verða roynt at banka á hvørjar dyr í landinum.

### Yvir 400.000 innkomnar via tlf.

– Eg má siga, at eg eri yvirraskaður av stóra hjálpseminum allan dagin ígjøgnum. Bæði av privatfólki og stovnum, sum ynskja at hjálpa, sigur Suni. Hann greiðir frá, at á skrivstovuni hjá Reyða Krossi, stendur ein bússa, sum fólk kunnu lata eitt oyra í, tá tey koma inn á gólvið.

– Tá eg tømdi hana í gjár, vóru yvir 7000 kr. latnar í bússuna. Fólk, sum koma inn á gólvið hava verið røsk at hjálpa, og vit hava eisini møtt fólki á gøtuni, sum hava givið okkum eitt oyra at lata í bússuna. Tá eg fór til hús í gjárkvøldið, var longu fitt av peningi komin í aftur bússuna, greiðir Suni Vinter frá.

Hann sigur eisini, at telefoninnsavnanin hevur givið úrslit. Longu nú eru innkomar yvir 400.000 kr.

Bowlinghøllin lat týskvøldið ein kekk áljóðadi 15.000 kr, tí teir eitt kvøldið lótu alt yvirskot til Reyða Kross. Tann tráðin hava fleiri matstovur nú tikið upp, og kunngera við matskráum, har alt yvirskotið fer til Asia.

– Sunnudagin verður tó størsta og landsumfatandi átakið. Út- og sjónvarpið fara at senda í sambandi við innsavnanina, bankarnir fara at hava opið, tónleikarar fara at spæla fyri einki, og talan hevur eisini verið um eina uppboðssølu. Og øll hava boðað frá, at tey arbeiða fyri einki, so hetta er fantastiskt, staðfestir Suni.

Hann sigur tó, at endaliga skráin allarhelst ikki verður klár, fyrr enn út ímóti vikuskiftinum.

# Ein hjálpandi hond í Svf og Úf

**Møguleiki verður hjá øllum Føroya fólki at fylgja við landsumfatandi innsavningini sunnukvøldið, tá Svf og Úf fara at samsenda úr Norðurlandahúsinum. Skráin er fjølbroytt, men serliga tónleikurin kemur at fylla nógv**

TSUNAMI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*







*Umframt symfoniorkestrið verða Teitur, Eivør og Kári P ímillum høvuðsnøvnini á stóru innsavningarkonsertini sum verður samsend sunnukvøldið*

Teitur Lassen, Eivør, Enekk, Føroya Symfoniorkestur, Kári P., Aldubáran, Karl Martin Samuelsen og dupultkvartettin úr Ebenezer verða ímillum stóru føroysku tónleikanøvnini, ið fara á pallin í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið. Fylgt verður eisini við innsavningini, so hvørt, sum peningurin kemur inn.

### Víðkað nýggjárskonsert

Ivan Niclasen úr Svf greiðir frá, at teir longu byrjaðu at fundast um eina tílíka samsending á nýggjárinum.

– Vit komu skjótt fram til, at lættasta og besta loysnin var at leggja eina tílíka sending saman við nýggjárskonsertini hjá symfoniorkestrinum. Tí tá varð øll útgerðin sett upp í Norðurlandahúsinum allíkavæl, greiðir Ivan frá. Tí bleiv tað til eina víðkaða nýggjárskonsert, sum fer at senda paralellt við skipaðu innsavningina, sum fer at fara fram um alt landið tá. Umframt symfoniorkestrið, sum nú kemur at hava eina nakað broytta skrá, verða eisini aðrir kendir tónleikarar at síggja á pallinum. Samarbeitt verður eisini við bankarnar, sum fara at hava opið sunnukvøldið, soleiðis, at fólk allatíðina síggja hvussu gongur við innsavningini. Tølini fara at verða kunngjørd so hvørt, sum peningurin kemur inn.

Okkurt tilfar verður eisini at síggja um vanlukkuna og verandi støðuna í Asia, og vertar verða bæði á pallinum og úti í forhøllini, har samrøður við ymisk viðkomandi fólk verða gjørdar.

– Innsavningartiltakið verður sligið saman við árligu nýggjárskonsertini hjá Symfoniorkestrinum. Tað verða ikki fleiri konsertir, men ein long, fjølbroytt og samanhangandi konsert, við ymiskum øðrum tilfarið inn ímillum eisini, slær Ivan fast.

### Lættur, virðiligur andi

– Tiltakið kemur at vara frá kl 19–23. Áðrenn vit enda kl 23, vóna vit at hava endaligu upphæddina av innkoma peninginum greiða, sigur Ivan.

Hann leggur dent á, at hóast talan er um eina innsavningarkonsert til eina vanlukku, so ætla tey at hava tilfarið lætt.

– Nakað, sum tónleikararnir løgdu dent á heilt frá byrjanini var, at hóast hetta verður ein innsavnan til eitt tragiskt endamál, so skal andin í konsertini og sendingini ikki bert vera tungur og tragiskur. Hann skal vera virðiligur og lættur. So tað fara vit at leggja okkum eftir, sigur hann.

Ivan sigur, at tað hevur verið lætt at fáa fólk at hjálpa til í innsavningartiltakinum.

– Øll arbeiðskraftin í hesum samtakinum verður ókeypis. Bæði út- og sjónvarpsfólk, tónleikarar, bankafólk og fólk í Norðurlandahúsinum fara at arbeiða ókeypis hetta kvøldið. Og tað hevur ikki verið nakar trupulleiki, tí fólk hava sjálvi boðið sær til tað, staðfestir Ivan Niclasen.

Enn er skráin ikki komin heilt undir land, tí onkrir smálutir eru framvegis eftir at koma uppá pláss, men í tí stóra og heila er skráin um at vera greið.

Øll 650 atgongumerkini til nýggjárskonsertina eru longu útseld.